

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 07 - 2012

# Føroyskir oljusjeikar út fyri vesturafrikonsku strondini

Cap Verde, 17.07.2012 Føroyingar stórtrívast í oljuvinnuni. Ì skrivandi løtu sigla 16 føroyingar útfyri vesturafrikonsku strondini umborð á COSL Promoter, ið er triði boripallurin á rað, sum er blivin bygdur á kinversku skipasmiðjuni Raffles. COSL Pioneer, sum júst nú borar á føroysku Brugduleiðini, er meinlíkur COSL Promoter, og Pioneer var tann fyrsti av trimum meinlíkum boripallum. Føroyingar, ið eru í starvi hjá PAM Offshore Service, hava verið við til at gera teir báðar seinastu pallarnar lidnar, nevniliga COSL Innovator og COSL Promoter. Føroyingarnir hava fingið góð skotsmál, og hetta seinasta hálva árið hava fleiri føroyingar verið við á ferðini hjá boripallunum, líka úr Kina til Noregs. Ferðin hjá einum boripalli úr Kina til Noregs tekur umleið 3 mánaðir, og teir sigla sjálvir. Ferðin er 9 míl. COSL Promoter verður væntandi inni í Las Palmas í Gran Canaria leygardagin 21. juli, har manning verður skift, samstundis sum proviantur, tilfar og annað skal umborð. Arbeiðið hevur gingið væl hjá føroyingunum, og veðrið hevur verið gott allan túrin. Mynd - Her føroyska manningin tikin á tyrlupallinum umborð. Fremst frá vinstru - Rúni Haraldsen, Heini Havn Magnussen, Rógvi D. Kjærbo, Dánjal Jákup í Brekkunum, Símin Hansen, Sofus Højgaard, Hans Jákup Johannesen, Òla Jákup Neshamar. Aftast frá vinstru - Ólavur Fredriksen, Bjarni Prior, Dánjal Johannesen, Petur Djurhuus, Òlavur Jacobsen, Bárður Friang Rasmussen, Magni Dam, og Jákup Johannus Dalsá.